# Uni leggur botnin

**Trummuleikandi jarðfrøðingurin Uni Árting hevur havt ein virknan leiklut í menningini av føroyskum tónleiki seinastu 14 árini. Við tíðini er Uni vorðin ein av Føroya allar bestu trummuleikarum. Á Planet Awards er hann við í fýra uppskotum til planetir**

## Útgávur har Uni Árting hevur luttikið:

**Rock í Føroyum**
- Ymisk (TUTL), 1995, lagið "9" við Mold

**Mullich Mulli**
- Mold (TUTL), 1996

**Rock í Føroyum 2**
- Ymisk (TUTL), 1997, Lagið "Vit eru 200" við 200

**Sun Magnet**
- Mold (TUTL), 1998

**Burn me**
- MC-Hár (3'arin), 1999

**TUTL 2000 Rock/Pop**
- Ymisk (TUTL), 2000, lagið [a'u:ga] - Mold

**Prix Føroyar 2001**
- Ymisk (3'arin)
Um tú ikki ert við uppá loysing, so ert tú skiti klikkaður - 200, Edmund - 200, Jóannes - 200

**200%**
- 200 (TUTL), 2001

**TUTL 25 ár Live**
(TUTL), 2002, Drive Me Over - Mold
Punkurin frá helviti 2 - 200

**Viva La Republica**
- 200 (TUTL), 2005

**Petur Pólson**
- Koma (TUTL), 2005

**Popplist 4**
(3'arin og TUTL), 2005, Musclemanblað - 200



## Sagt um Una:

**Niels Arge Galán um Una:**

"Uni er besti trummuspælari, eg nakrantíð havi spælt við. Vit báðir hava spælt tónleik saman síðani vit vóru 14.
Uni er raskasti maður, eg kenni. Hevur 2 lítlar synir, hús, bil og unnustu, er við at gerast doktari í jarðfrøði OG spælir í harðasta rokkorkestri í landinum.
Eg eri sera, sera góður við Una. Hann er mín besti vinmaður."

**Petur Pólson um Una:**

"Eg ivaðist ongantíð í, um hvør skuldi spæla trummur. Uni er ein fantastiskur trummusláari."

PLANET AWARDS
Niels Uni Dam
nielsuni@sosialurin.fo

Uni Árting er fýra ferð í uppskoti til planetir fyri sítt trummuspæl í 200 og hjá Peturi Pólsyni. Fløgurnar Viva La Republica og Koma eru í uppskoti til planetina fyri bestu útgávu, 200 er í uppskoti til planetina fyri besta føroyska og Petur Pólsson fyri besta nýggja.

### Orkumaskina

Uni er ivaleyst best kendur sum orkumaskinan í 200, sum við 200 km/t buldrar avstað. Hann er ein av Føroya bestu trummuleikarum og hevur seinastu 14 árini verið ein týdningarmikil viðleikari í menningini av føroyskum tónleiki.

### Ruskmálmur á føroyskum

Fyrstu ferð Uni var at síggja á føroyska tónleikapallinum var í ruskmálmsbólkinum Oblivion. Oblivion var fyrsta føroyska boðið uppá ein bólk, ið spældi hetta slagið av tónleiki. Løgini vóru øll egin og nøkur á føroyskum. Hetta var í 1992 og var nærum óhoyrt tá, tí flest allir rokkbólkar spældu lániløg í teirri tíðini, og teir, ið skrivaðu tónleik, skrivaðu flest allir á enskum.

### Føroyski grungebólkurin

Eftir at Uni og bassleikandi sangarin Niels Arge Galán góvust í Oblivion, ið tó helt áframm nøkur ár eftir hetta, stovnaðu teir bólkin Mold saman við Niclasi Thorsteinssýni, Kristin N. Bech og Gudmundi Helmsdal. Mold myndaði tann føroyska grunge pallin í fleiri ár, og var eitt stórt tónleikanavn í miðjum 90'árunum. Bólkurin luttók á fyrstu Prix Føroyar finaluni í 1995 og á fyrstu Rock í Føroyum fløguni hjá TUTL í 1995. Mold gav seinni tvær fløgur út Mullich Mulli 1996 og í 1998 Sun Magnet.

### Gimpar, hasj og helviti

Saman við Niels og bassleikaranum Mikael Blak stovnaði Uni alternativa rokkbólkin 200. Burtur úr hesum samstarvi kom í 1997 sangurin "Vit eru 200" á TUTL fløguni Rock í Føroyum 2, ein sangur sum skuldi prógva at alternativur rokkur væl kann syngjast á føroyskum. 200 flutti seg yvir í punkin og gav í 2001 fløguna "200%" út, við speirekandi fullveldispunki og sangum um gimpar, hasj og helviti. 200 luttók í Prix Føroyum í 1997 og í 2001, í 2001 eydnaðist tað at koma í finaluna.

### Beint í upptøkuhølið

Í 1999 fór trummuleikarin í MC-Hár úr bólkinum eina viku áðrenn upptøkurnar til fløguna Burn Me skuldu byrja. Táverandi gittarleikarin í MC-Hár Niels Arge Galán ringdi beint eftir Una, ið trein inn í upptøkuhøli og spældi alíkavæl frálíkt á fløguni. Bæði Niels og Uni fóru stutt eftir burtur úr bólkinum og løgdu næstu árini alla sína orku í hjartabarnið 200.

### 200 til Føroya fólk

Í 2004 flutti Uni heim til Føroyar aftan á at hava verið í Danmark og lisið jarðfrøði.Tónlistarliga gjørdist 2005 árið har 200 gjørdust Føroya størsti rokkbólkur. Teir vóru føroyska høvuðsnavnið á tveimum festivalum, spældu á AME í Føroyum og í Danmark, teir vóru í Grønlandi og spældu á festivali har, umframt sera væleydnaða luttøku á íslendska festivalinum Airwaves. Teir hava havt eitt lag ovast á 15 teimum bestu í 9 vikur, hava ligið ovast á sølulistanum í fleiri vikur, og spældu á Mentanarnáttini fyri einum stúgvandi fullum SMS.
Nýggjasta fløgan hjá 200 Viva La Republica kom út í 2005. Hon hevur fingið frálík ummæli, og er vorðin fólkaogn. Tað er einki undur í, at bólkurin er í uppskoti til tvær Planet virðislønir.

### Sniðgevi og listamaður

Uni og Niels vunnu í fjør AME virðislønina fyri snøggasta fløguhúsa fyri Viva La Republica. Teir hava samstarvað um fløguhúsar í nógv ár, og eiga nakrar av flottastu føroysku verkunum í hesari listagreinini. Teir hava innan fyri hetta økið lyft føroyska støðið sera langt upp, og eiga stóran lut í æruni fyri at føroyska fløguhúsalistin er á so høgum støði. Umframt fløguhúsar hava Uni og Niels gjørt annað grafiskt arbeiði, sum t.d. plakatir og heimasíður. Innan fyri heimasíðulistina er Uni vorðin sera dugnaligur, og ger sera snotiligt arbeiði.

### Uni uttan Niels

2005 gjørdist eisini árið, tá Uni veruliga byrjaði at gera um seg uttan Niels Arge Galán. Síðan fyrstu tíðina í Oblivion hava Niels og Uni spælt saman. Men í bólkinum hjá Knút Háberg Eysturstein spælir Uni og ikki Niels, tað sama er galdandi í bólkinum hjá Peturi Pólsyni. Á fløguni hjá Peturi leggur Uni trygga botnin, og er motorurin í berur fløguna fram. Uni er við árunum vorðin ein av Føroya bestu trummuleikarum.